**Getsemane, á Brekku 19 Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 20.30 Ungdómsmøti
Leygardagin kl. 10 Morgunbøn
Sunnudagin kl. 14 Møti við sunnudagsskúla.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 Morgunmøti.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøld kl. 18 Møti.
Mánakvøld kl 20 bønarmøti.

**Kfum og Kfuk, Klaksvik**
Sunnudagin kl.14 sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl.18 Møti við Johannes Johannesen. Ungdómsmøti kl. 21 við ung av Skála.
Mánakvøldið kl. 20 møtist KBBB evni "Rutharbók" við Hildu Viderø, allar kvinnur eru vælkomnar.
Øll vælkomin.
www.kuff.fo

**Ósáskúlin, Klaksvík**
Mánakvøldið kl. 20 Evangeliskt møti við Erik Lund og Lloyd Haugen.
Øll eru vælkomin!

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 14.00 verður barnamøti.
Sunnudagin kl. 11.00 verður morgunmøti v/Ásbjørn Kjærbo.
Sunnudagin kl. 18.00 verður møti v/Ruth & Stanley Olsen.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangur, kl. 18 Møti. Innsavnan.
Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Sunnudagsskúlin byrjar kl. 16.00. Børnini í Húsavík og Dali eru vælkomin við.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin sunnudagsskúli kl. 14, onki møti vegna missiónsviku í Vági.

**Missiónshúsið í Vági**
Missiónsvikan heldur fram fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20, sunnudagin kl. 18, við Regin Høgnesen, Dánjal Andreasen og Sigfred Johannesen. Kórið av Tvøroyri, Kórið úr Sumba og Kórið úr Porkeri luttaka.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygarkvøld kl. 20 Sang og vitnimøti.
Sunnudag kl. 11 Halgunarmøti. Jógvan Lamhauge talar.
Kl. 14 Sunnudagsskúli.
Kl. 17.30 Bønarløta.
Kl. 18 Evangeliskt møti.
Jógvan Lamhauge talar.
Mánadag kl. 7 Morgunbøn.
Øll eru vælkomin í Frelsunarherin.
www.frelsunarherurin.fo

**Missiónshúsið í Hvalba**
Barnagudstænasta verður í Hvalbiar kirkju sunnudagin kl. 14 við Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan.

**Betania, Sumba**
Møti verður sunnukvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Jólahugni í Hirtshals**
Saman við føroyingafelagnum í Hirtshals verður jólahugni í missiónshúsinum (Vestergade 13) - sunnudagin 3. des kl. 16.
Vit dansa jólatræ, syngja jólasangir, fáa jólapakkar, rísalamande, kaffi, upptøka til jólaheilsanir o.a.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Sjómansheimið Ørkin Brautarholt 29, Reykjavík**
Hvønn sunnudag kl.17.00 og fram til mai 2007 er møti á Ørkini.
Sunnudagin 26 nov kl. 17 er möti á Föroyska Sjómansheiminum í Brautarholti 29, Reykjavík.
Roðari er Símun Hansen, og onnur frá Føroyum luttaka við sangi og vitnisburði!
Øll eru hjartaliga vælkomin!
Drekkamuður er at fáa aftaná.

**Felagið Tórshavn, spákingartúrur**
Leygardagin 25. november verður spákingartúrur: Hattahandlar í gomlu Havnini. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 14. Tilmelding.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@torshavn.fo
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
***Mánadagin 27. nov.:***
kl. 10.00-10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00-11.45: **Enskt talumál á loftinum**.
kl. 14.00-17.00: Kortspæl, telving, landastrok, kánus, bobbspæl, dart o.o. spøl.
*Møguleiki er at koma sum gestur til døgurðan mikudag og fríggjadag. Tilmelding á tlf. 316491.*
***Søluframsýning í kjallaranum: Leirlist og handverk Petsia Skipanæs/Wanja Petersen. Frá 25. nov. til 1. des. kl. 10-18. Undantikið sunnudagin 14-18.***
***Týsdagin 28. nov.:***
kl. 10.00-11.30: Vit syngja, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15-17 Opið hús
kl. 10-18 ***Søluframsýning í kjallaranum***. Leirlist og handverk. Petsia Skipanæs/ Wanja Petersen
***Mikudagin 29. nov.:***
kl. 10.00-13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou.
kl. 10-17 Rudda handverksrúmið á loftinum
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur: Viðalundina, Dalagøtu og eftir Oyggjarvegnum. Randi Petersen og Elisbeth Andreassen
kl. 10-18 Søluframsýning í kjallaranum. Leirlist og handverk, Petsia Skipanæs/ Wanja Petersen
***Hósdagin 30. nov.:***
kl. 10.00-10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 11.00 **Lesibólkurin:** Vit lesa Sebastians hús, hjá Oddvør Johansen, hittast 7. des. kl. 11.00. Bergljót Madsen.
kl. 14.00-16.00: Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
kl. 10-18 Søluframsýning í kjallaranum. Leirlist og handverk, Petsia Skipanæs/ Wanja Petersen
***Fríggjadagin 31. nov.:***
kl. 10.00-13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou.
kl. 10-17 Rudda handverksrúmið á loftinum
kl. 12.00: Døgurði
kl. 13.30-17 Opið hús

Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Sosialráðgevar til Stuðulstænastuna

Tvey størv sum sosialráðgevi í Stuðulstænastuni eru leys at søkja.

**Uppgávur:**
- Ráðgeva og vegleiða
- Samskipa stuðulin, eisini tá fleiri stovnar eru inni í myndini
- Viðgera nýggjar umsóknir
- Ráðgeva feløgum, stovnum og sambýlum v.m.
- Endurmeta ta hjálp, sum er veitt einum brúkara

**Vit sóknast eftir tveimum starvsfólkum, ið**
- Hava vitan og royndir innan sosiala økið
- Hava áhuga at arbeiða við brekaðum
- Duga at skapa jaligt og virðiligt samband við brúkaran
- Duga væl at orða seg munnliga og skrivliga
- Duga at arbeiða skipað og miðvíst
- Dáma at arbeiða bæði sjálvstøðugt og tvørfakliga
- Eru sálarliga væl fyri og dáma avbjóðingar
- Eru uppfinningarsom og duga at umstilla seg skjótt

**Vit bjóða:**
- Eitt mennandi arbeiði, har nógv er at gera
- Eitt arbeiðsumhvørvi, har pláss er fyri látri
- Vegleiðing
- Supervisión

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða sett 1. januar 2007 ella skjótast til ber hareftir.

Talan er um størv í Nærverkinum. Tænastustaðurin í løtuni er Stuðulstænastan. Lønin verður ásett eftir sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Vilt tú vita meira um størvini, ert tú vælkomin at venda tær til Nærverkið á tlf. 304020 og tosa við Regin Johansen, virkandi stjóra.

**Umsóknir**
Send eina umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. til:
Nærverkið
Stílað: Regin Johansen, virkandi stjóri
Postsmoga 3037
Eirargarður 2, 2. hædd
100 Tórshavn

**Umsóknarfreistin**
**er 11. desember 2006.**

*Stuðulstænastan fevnir um stuðul til umleið 114 heimabúgvandi brúkarar, svarandi til umleið 42 fulltíðarstørv.*

Heimatænastan

## Avloysari fyri sjúkrarøktarfrøðing í farloyvi til Heimatænastuna í Eysturoynni

Søkt verður eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing í farloyvi at byrja skjótast til ber.
Arbeiðstíðin er 32t/viku í skiftandi vaktum, tó mest dagvaktum.
Arbeiðið umfatar sjúkrarøkt og vegleiðing til borgarar, sum búgva heima ella á eldrasambýli.

**Førleika:**
- Prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Fakligan áhuga fyri primera økinum
- Fleksibilitetur
- Góð samstarvs- og samskiftisevni

**Vit bjóða:**
- Eitt avbjóðandi, fjølbroytt og sjálvstøðugt starv í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar
- Innleiðslu
- Tænastubil

**Lønar- og setanartreytir:**
Talan er um starv í Nærverkinum við fyribilstænastu í øki 3, sum umfatar allar kommunur í Eysturoynni uttan Eiðis- og Sunda kommunu. Lønin verður ásett eftir sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Setanartíðarskeið: 16.12.06 -15.11.07 ella eftir nærri avtalu.
Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Ásu Hanusson, økisleiðari, á tlf. 449249.

Send eina umsókn við prógvi við meira.til:
Heimatænastan Eysturoy
Økisskrivstovan, Heilsumiðstøðin
Postboks 47
FO 610 Saltangará

**Umsóknarfreistin**
**er 10. desember 2006**

Heimatænastan

## Røktarstarvsfólk til Heimatænastuna í Suðurstreymoy

Vit sóknast eftir røktarstarvsfólkum til Heimatænastuna í Suðurstreymoy.

**Talan er um:**
Ein heilsurøktara í føstum starvi 32 t/vikuna frá 15. desember 2006 ella skjótast til ber.

Tveir heilsuhjálparar í føstum starvi 35 t/vikuna frá 15. desember 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Lønar- og setanartreytir:**
Talan er um starv í Nærverkinum við fyribilstænastu innan Heimastænastuna í Suðurstreymoy. Lønin verður ásett eftir sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Vilt tú vita meira um størvini, ert tú vælkomin at venda tær til Metu av Fløtum, økisleiðari, á tlf. 317249.

Send eina umsókn við møguligum prógvum og viðmælum til:
Nærverkið
Heimatænastan
Att. Økisleiðarin
Skálatrøð 14
FO-100 Tórshavn

**Umsóknarfreistin**
**er 10. desember 2006**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ
Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo
sansir.fo
www.naerverk.fo